UTTAN ÚR HEIMI

## Óttast oljuskip

Seinastu árini er oljuflutningurin úr Russlandi ígjøgnum Eystrasalt og tey donsku sundini vaksin nógv, og samstundis veksur óttin fyri umhvørvisdálking, skuldi eitt óhapp hent einum av teimum nógvu tangaskipunum.

Myndugleikarnir í londunum við Eystrasalt hava roynt at fáa russar at taka undir við einum sáttmála, sum skal bøta um trygdina við flutninginum, men higartil uttan úrslit. Á einum fundi í Finnlandi herfyri eydnaðist tað tó at fáa russar at taka undir við einari semju, sum sigur, at Russland skal leggja seg eftir at tryggja flutningin á besta hátt. Kortini er ivasamt, hvønn týdning semjan hevur, tí tað vóru embætismenn og ikki politikarar, sum skrivaðu undir hana.

Russar eru í ferð við at útbyggja og nútímansgera oljuhavnina við Sankta Pætursborg. Í dag kunnu teir avskipa 12 milliónir tons haðani um árið, men orkan verður nú útbygd til 45 milliónir tons.

## Semju við IMF

Í vikuni eydnaðist tað argentinsku stjórnini at fáa eina semju við Altjóða Gjaldoyragrunnin IMF um, hvussu landið skal rinda sína ovurstóru uttanlandsskuld.

Argentina skuldi rinda IMF 2,9 milliardir dollarar í rentum og avdrøgum í vikuni, men Nestor Kirchner, forseti, gav stjórnini boð um at útseta gjaldið, tí tað fór at krevja ein fjórðing av landsins gjaldoyragoymslum. Dagin eftir fekst semjan við IMF í lag, men treytin frá grunninum er, at landið skal rinda fallin avdrøg og falnar rentur. Hinvegin sleppur Argentina undan at rinda 21,6 milliardir dollarar í avdrøgum tey næstu trý árini. Hesa tíðina skal landið bert rinda renturnar.

Men IMF hevur lagt treytir við. Stjórnin í Buenos Aires hevur bundið seg til, at hallið á fíggjarlógini skal ikki fara upp um trý prosent næsta ár, og at búskaparvøksturin skal upp á trý prosent um árið.

## Heimsins longsta flogleið

Flogfelagið Singapore Airlines ætlar at fara undir rutuflúgving millum Singapore og Los Angeles, uttan at flogførini skulu millumlenda.

Singapore Airlines sigur, at ætlanin er at fara undir rutuna næsta ár, og at felagið fer at nýta flogfør av slagnum Airbus340-500 til nýggju farleiðina. Í løtuni eru samráðingar við fakfeløgini hjá teimum, sum manna flogførini hjá felagnum. Felagið sigur, at í góðum líkindum fer túrurin millum Singapore og Los Angeles at taka umleið 16 tímar, men er veðrið ikki til vildar, fara upp ímóti 18 tímum til ferðina.

Eitt annað flogfelag í Asia, Thai Air, umhugsar at fara undir beinleiðis flúgving millum Bangkok og Chicago.

## Mussolini var hjartagóður

So er hann komin í eldin einaferð afturat, italski forsætisráðharrin Silvio Berlusconi.

Hósdagin segði hann, at fyrrverandi italski einaræðisharrin, Benito Mussolini, var hjartagóður, og at hann hevði ikki blóðdálkaðar hendur. Í einari samrøðu við tveir bretskar tíðindamenn segði Berlusconi, at Mussolini drap ongan, og at hann kundi als ikki samanberast við fyrrverandi irakska einaræðisharran, Saddam Hussein.

Jødarnir í Italia eru sum vera man í øðini inn á forsætisráðharran, og vinstraflokkarnir hava kravt, at hann skal biðja um umbering. Søgumenn eru heldur ikki samdir við Berlusconi. Ein teirra, Richard Brosworth, sigur, at einaræðistíðin hjá Mussolini kostaði minst einari millión fólkum lívið.

# Palestinar sláa ring um Arafat


*Yasser Arafat varð dúgliga fagnaður, eftir at ísraelska stjórnin hevði gjørt eina prinsippsamtykt um at koyra hann í útlegd*

**Túsundtals palestinar savnaðust uttan fyri skrivstovuna hjá Yasser Arafat, eftir at ísraelska stjórnin hevði gjørt eina prinsippsamtykt um at koyra hann í útlegd.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska samtyktin elvdi til vreiði í teimum palestinsku økjunum. Í býunum á Vestara Áarbakka og í Gazageiranum runnu fólk í túsundatali út á gøturnar at mótmæla og at fagna Arafat.

Uttan fyri skrivstovu hansara í Ramallah savnaðust eini 4.000 fólk at fagna forsetanum. Sjálvur fór Arafat út at taka ímóti fagnaðinum, sjálvt um ísraelskir snigskjúttar stóðu bert fáar hundrað metrar frá honum.

- Míni elskaðu. Tit eru eitt djarvt fólk, og tað eru tit, sum mugu mugu møta hesari ísraelsku hóttanini, rópti Arafat.

Palestinskir talsmenn hava sagt, at ger ísraelska stjórnin álvara av samtyktini, verður tað tulkað sum ein beinleiðis krígsavbjóðing.

Umheimurin tekur ikki undir við Ísrael. Hvítu Húsini í Washington siga, at amerikanska støðan í spurninginum um at burturvísa Arafat er ikki broytt. Russland og Frakland siga tað sama, og egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, segði í gjár, at Ísrael ger eitt álvarssamt mistak, verður Arafat koyrdur í útlegd.

# Svenska løgreglan fyri hvøssum atfinningum

**Løgreglan undirmetti vandan fyri, at onkur kundi fara at gera seg inn á Onnu Lindh, og arbeiðið hjá løgregluni aftan á morðið var heldur ikki nóg gott.**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Løgreglan sveik. Tað er niðurstøðan hjá svensku fjølmiðlunum og fleiri svenskum politikarum aftan á morðið á Onnu Lindh, uttanríkisráðharra.

Dan Eliasson, sum er ríkisskrivari í løgmálaráðnum, sigur við Dagens Nyheter, at tað er neyðugt at umskipa arbeiðsháttin hjá trygdarløgregluni Sæpo, tí eingin ivi kann vera um, at tá ein ráðharri verður myrdur, hevur trygdarløgreglan svikið, sigur hann.

Formaðurin í lógarnevndini hjá Ríkisdegnum, Johan Pehrsson, heldur, at trygdarløgreglan undirmetti vandan fyri, at Anna Lindh kundi verða álopin. Sæpo helt ikki, at nakar vandi var á ferð, men nú er Anna Lindh deyð, sigur Johan Pehrsson.

Svensku fjølmiðlarnir eru á einum máli um, at trygdarløgreglan sveik, og teir finnast eisini at arbeiðinum hjá løgregluni aftan á morðið. Dagens Nyheter vísir millum annað á, at løgreglan stongdi ikki vegirnar og jarnbreytirnar út úr Stockholm, og at drápsmaðurin tí fekk góðar stundir at sleppa sær úr høvuðsstaðnum, ætlaði hann tað.

Heldur ikki læknarnir á Karolinska sjúkrahúsinum sleppa undan atfinningum. Víst verður á, at Anna Lindh doyði klokkan hálvgum seks hósmorgunin, men at deyðsboðini vórðu ikki borin almenninginum fyrr enn fýra tímar aftaná.

Lesið meiri um Lindh-morðið á teimum báðum næstu síðunum.



UTTAN ÚR HEIMI

# Hon vildi ikki fjala seg burtur

**Anna Lindh visti um vandarnar. Olof Palme royndi at læra hana at tosa meiri seigliga og kanska eisini at liva meiri stillisliga. Men tað miseydnaðist.**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Anna Lindh var kend sum eitt sera virkið fólk, ikki bert í tí politiska lívinum, men eisini uttan fyri tað dagliga politiska knossið. Hon helt seg ongantíð aftur, men bar orð fyri at játta, hvørja ferð hon fekk eina áheitan. Tí segði hon ja, tá hon bleiv biðin at taka við sum umhvørvisráðharri, og hon svaraði eisini ja, tá hon bleiv biðin til uttanríkisráðharra.

Tá hon gjørdist ráðharri, ávaraði undanmaður hennara hana um, at frá hesum degi var hon ikki ókend longur.

- Eg vildi fegin verið ókend, tá eg eri úti við børnunum. Ikki tí, tey flestu eru vinarlig ímóti mær. Men eg koyri ikki við undirgrundarbreytini um kvøldið longur. Mær dámar væl at koyra í toki ella bussi, men eg haldi burtur frá støðum, har drukkin fólk halda til, segði Anna Lind í samrøðu við blaðið Expressen fyrr í ár.

Sum politikari gjørdi hon skjótt vart við seg, og hon legði ikki fingrarnar ímillum. Tað sigst, at tá Ríkisdagurin einaferð viðgjørdi eitt uppskot um fast samband um Oyrasund, rópti Ingvar Carlsson, forsætisráðharri, hana aftur um eit tjald og gav henni eina rættiliga skortfleingju fyri tað, sum hon hevði sagt.

Men hon stóð við sítt, og hennara hugsjónir vóru ikki til at vika. Tá Svøríki hevði formansskapin í ES, fekk hon rættiliga høvi at vísa umheiminum síni evni, og úrslitið varð eisini, at tær flestu atfinningarsomu røddirnar tagnaðu.

Heldur ikki teir stóru uttanlands smæddist hon. Bush, forseta skýrdi hon "tann einsamalla reiðmannin" í sambandi við Irakkríggið. Men hennara framferð var kortini av slíkum slagi, at Colin Powell, uttanríkisráðhari, einaferð helt fyri, at sviar áttu trý góð: Abba, Volvo og Onnu Lindh.

Grækarismessudag í ár var Anna Lindh stødd bert nakrar fáar hundrað metrar frá staðnum, tá serbiski forsætisráðharrin, Zoran Djindjic, varð skotin í Beograd.

- Tað var skelkandi og ræðandi at vera so tætt hjá, segði hon aftaná.



# Morðið á Onnu Lindh rívur sárini eftir Palme- morðið uppaftur

**Norðurlond vórðu roknað sum eitt friðarligt øki, men Palme-morðið broytti ta uppfatanina. Vit eru ikki so skelkað longur, heldur norskur professari.**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Hetta er ræðuligt og átti ikki at verið hent, og tað fer uttan iva at ríva sárini eftir morðið á Olof Palme uppaftur.

Tað sigur Peter Essaiasson, professari á lærda háskúlanum í Gøteborg.

Olof Palme varð skotin í Stockholm tann 28. februar í 1986, eftir at hann og konan júst vóru komin út úr einari biohøll. Morðið setti djúp spor í svenska samfelagið. Professarin sigur, at nógv er hent síðani.



- Vit hava sæð fleiri royndir at myrða politikarar kring heimin. Morðið á niðurlendska politikaran Pim Fortuyn og álopið á týska politikaran Oskar Lafontaine, sum varð stungin við knívi, kunnu berast saman við morðið á Onnu Lindh, sigur Peter Esaiasson.

Norski professarin Hanne Marthe Narud væntar, at morðið í Stockholm mikudagin kana fara at hava við sær, at norðurlendskir politikarar skulu verjast munandi betur.

- Vandi kann vera fyri, at vit fáa slík viðurskifti, at eingin torir at fara upp í politikk longur. Ella at politikararnir ikki tora at fara út fyri dyr, uttan at trygdarfólk eru við teimum. Slík viðurskifti vil eingin okkara hava, sigur hon.

Hanne Marthe Narud sigur, at samfelagið er vorðið meiri rátt, síðani Olof Palme varð myrdur.

- Tá vórðu Norðurlond roknað sum eitt friðarligt øki. Politisk morð vóru púra ókend á okkara leiðum. Í dag hugsa vit, at slíkt er ræðuligt, men vit eru ikki skelkað á sama hátt sum fyri 17 árum síðani.